Landsbanki Føroya

FAROE ISLANDS
GOVERNMENTAL BANK



# ÁRSFRÁGREIÐING 2018

## INNIHALD

Um Landsbankan .................................................... 3
Nevnd .................................................... 3
Starvsfólk .................................................... 3
Gjaldføri landskassans .................................................... 3
Gjaldførisavkast .................................................... 4
Landskassaskuld .................................................... 5
Kredittmeting .................................................... 6
Greiningarvirksemi .................................................... 6
Fíggjarviðurskifti Landsbankans .................................................... 7
Føroya Váðaráð .................................................... 7

## Um Landsbankan

Landsbankin er almennur fíggjarstovnur, sum umsitur landsins gjaldføri og lántøku. Hann er eisini greiningarstovnur, ið virkar fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum. Landsbankin er skrivstova hjá Føroya Váðaráði og umsitur Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Búskapargrunnin.

### Nevnd

Nevndin er skipað við sjey limum. Nevndarlimirnir verða valdir fyri trý ára tíðarskeið og kunnu í mesta lagi veljast fýra ferðir. Nevndarlimir skulu hava fakligar førleikar innan eitt ella fleiri av førleikaøkjunum: búskaparfrøði, fígging og kredittmeting og serligt innlit í føroyska fíggjargeiran ella búskapin í Føroyum. Nevndarlimir bankans eru:

- Tummas T. Eliasen, formaður
- Jan Otto S. Holm, næstformaður
- Zvonko Mrdalo
- Elisabeth Eldevig
- Kristoffur Laksá (Fróði Magnussen frá 1. januar 2019)
- Mathea Hilduberg
- Edvard Heen

Nevndin hevur havt ellivu fundir í 2018. Á hvørjum fundi verður hugt og fylgt við gjaldførisgongdini, avkasti og skuld hjá landskassanum. Tvær ferðir í árinum hevur stjórin greitt nevndini meira nágreiniliga frá hesum evnum. Nevndin hevur eisini javnan umrøtt eftirlit við ásetingum í lóggávu og kørmum – eitt nú eftirlit við minstagjaldførinum og íløgukørmunum. Nevndin hevur eisini viðgjørt frágreiðingina hjá landsgrannskoðaranum um Landsbankan. Frágreiðingar hjá búskaparráðnum og Tjóðbankanum, hava eisini verið umrøddar á nevndarfundum, tá tær eru almannakunngjørdar.

Nevndin hevur eisini gjørt ein innlánspolitik, ásett treytir í sambandi við útboð av íløgurrøkt og viðgjørt misjón og visjón hjá Landsbankanum. Samskiftisætlan er í gerð, og heimasíðan varð eisini tikin í nýtslu í 2018.

### Starvsfólk

Við ársbyrjan 2017 vóru fimm starvsfólk í Landsbankanum. Umframt stjóran sótu trý starvsfólk við bankapartinum og eitt við greiningarpartinum. Síðani tá hevur Landsbankin økt starvsfólkatalið serliga til at greiningarpartin. Í dag starvast 8 starvsfólk í landsbankanum. Umframt føstu starvsfólkini, hevur Landsbankin eisini brúkt ráðgevar til avmarkaðar uppgávur bæði til greiningar og KT.

## Gjaldføri landskassans

Lógin um Landsbanka Føroya staðfestir, at landskassin skal hava 15 prosent av BTÚ í minstagjaldføri. Ásetingin kom fyrst beint eftir kreppuna í 90 árunum, fyri at tryggja, at landskassin í kreppustøðum hevur tøkan pening at rinda lønir, pensjónir og aðrar útreiðslur. Tiltaksgjaldførið er nóg stórt at rinda skyldurnar í seks mánaðar, hóast landskassin ongar inntøkur hevur.

Í 2018 skuldi landskassin soleiðis hava í minsta lagi 2,6 mia. kr. í gjaldføri. Stórur partur av hesum peningi er settur í ymisk virðisbrøv uttanlands. Landsbankin leggur eina ætlan fyri gjaldførið hjá landskassanum, soleiðis at landskassin fær eitt hóskandi avkast, tó við atliti til váðan. Meginparturin verður settur í stats- og realkredittlánsbrøv (2,4 mia. í miðal), nakað í altjóða partabrøv (477 mió. kr. í miðal) og nakað í kredittlánsbrøv (384 mió. kr í miðal). Íløguheimildin hjá Landsbankanum liggur á heimasíðuni www.landsbankin.fo.[1]

[1] Gamalt er at øll egg ikki mugu leggjast í somu kurv. Soleiðis er eisini við virðisbrøvum – at best er at seta pengar í fleiri enn eitt slag av virðisbrævið. Ein íløgurøð er tí ofta sett saman við ymiskum sløgum av lánsbrøvum

Íløgurøktin er veitt út til fimm ymiskar norðurlendskar íløgurøktarar. Landsbankin umsitur eisini sjálvur eina íløgurøð við stats- og realkredittlánsbrøvum – hetta fyri at fáa neyðuga smidleikan í gjaldførið til raksturin hjá landinum. Ein lítil partur av gjaldførinum er eisini settur í alternativar íløgur, eitt nú í undirstøðukervi og mikrolán (í miðal 98 mió. kr.).

Av gjaldførinum hjá landskassanum liggja í miðal bara 150 mió. kr. í Føroyum – hetta er neyðuga upphæddin til dagliga raksturin. Restin er sett uttanlands fyri at spjaða váðan. Koma føroysku peningastovnarnir í kreppu, er ikki gott, um landið hevur allar pengarnar í føroyskum peningastovnum, tí so er vandi fyri, at landið ger kreppuna verri. Tí stendur peningurin uttanlands og kann í eini handavending takast út at rinda lønir, pensjónir v.m. um á stendur. Í tílíkum føri verða føroysku peningastovnarnir heldur ikki órógvaðir av, at landið tekur nógvar pengar út, tí peningurin stendur ikki á bók hjá teimum. Henda gjaldførisætlan er sostatt grundleggjandi fyri fíggjarliga støðufestið.

Mynd 1 vísir gongdina í gjaldførinum hjá landskassanum í 2018. Eisini sæst miðal gjaldførið fyri alt árið og minstagjaldførið (kravið á 15 prosent í gjaldføri av BTÚ). Sum myndin vísir er miðalupphæddin (reyð linja) væl omanfyri minstagjaldførið (blá linja). Miðalupphæddin er 3,4 mia. kr. Tíðirnar eru góðar, og tí er yvirskot í landskassarakstrinum.

## Gjaldførisavkast

Talva 1 vísir árliga gjaldførisavkastið hjá landskassanum síðani 2014. Avkastið var gott í 2014, 2016 og 2017. Lítið avkast var í 2015 og 2018




*Mynd 1 – Gjaldføri hjá landskassanum í 2018*

(obligatiónum) og partabrøvum. Samansetingin hevur týdning, tí oftast gongur væl við partabrøvum, tá ið illa gongur við lánsbrøvum, og øvugt. Á fakmálið eitur tað at samvariatiónin er negativ, at tá tað eina gongur væl gongur hitt illa. Soleiðis verður váðin meira spjaddur.

var fyrsta árið við negativum avkasti, síðani farið var undir hetta virksemi.

Her er týdningarmikið at vísa á, at virðisbrævakursir (partabrøv, lánsbrøv, kredittlánsbrøv v.m.) sveiggja hvønn dag. Hækkar kursurin, fær landskassin meira fyri virðisbrævið, tá ið tað verður selt. Minkar kursurin, fær landskassin minni.

Í Talvu 1 er avkastið av íløgurøktini víst fyri hvørt ár. Men fyri at meta um, hvørt ein íløgustrategi er góð, er rættari at hyggja at miðalavkastinum í einum fimm ára tíðarskeiði. Síðani 2014 hevur miðalavkastið verið 2 prosent ella knappar 44 mió. kr. um árið.

| | Avkast % | Avkast mió. kr. |
|---|---|---|
| 2014 | 3,93 | 85,7 |
| 2015 | 0,53 | 10,0 |
| 2016 | 3,88 | 86,7 |
| 2017 | 2,81 | 79,6 |
| 2018 | -1,35 | -44,9 |
| **Miðal 14-18** | **2,00** | **43,4** |

*Talva 1 – Avkast av gjaldføri hjá landskassanum síðan 2014*

Yvirhøvur var 2018 eitt ófriðarligt ár á fíggjarmarknaðinum. Til dømis var miðalavkastið hjá donskum pensjónskassum -4,8 prosent (Børsen). Árið byrjaði illa, men apríl, mai og juli vóru frægari. Oktober og desember vóru serstakliga ringir.

Búskaparvøksturin í USA og Kina hevur verið í minking, og tað hevur merkt marknaðin negativt. Eisini á politiska pallinum eru viðurskifti sum elva til ótryggleika, millum annað handilsstríðið millum Kina og USA, almennar viðmerkingar hjá Donald Trump, Brexit, ófriður í Fraklandi og ósemja millum ES og Italia um italsku fíggjarlógina.

2019 sær hinvegin út til at fara at hilnast betur. Verður hugt at avkastinum hjá landskassanum frá 1. januar til 20. februar í ár (Talva 2), er tapið í 2018 longu vunnið inn aftur.

| | Miðal íløga mió. kr. | Avkast mió kr. | Avkast % | Býtið % |
|---|---|---|---|---|
| Partabrøv | 572 | 70,7 | 12,37 | 15,8 |
| Statslánsbrøv | 88 | 0,5 | 0,54 | 2,4 |
| Realkreditt-lánsbrøv | 2.449 | 11,2 | 0,46 | 67,5 |
| Kredittlánsbrøv Investment Grade | 89 | 1,4 | 1,56 | 2,5 |
| Kredittlánsbrøv Non Investment Grade | 238 | 9,7 | 4,08 | 6,6 |
| Alternativar íløgur | 105 | 1,5 | 1,44 | 2,9 |
| Onnur fíggjaraktiv | 88 | 0,5 | 0,61 | 2,4 |
| **Íløgur tilsamans** | **3.630** | **95,6** | **2,63** | **100,0** |

*Talva 2 – Avkast hjá landskassanum og uttanhýsis grunnum í 2019 (1/1-20/2) býtt á aktivklassar*[2]

Virksemið á bankapartinum hevur í 2018 verið merkt av, at íløgurrøktin hevur verið boðin út, bæði fyri landskassan og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (AMEG), sum Landsbankin umsitur. Nógv arbeiði hevur verið av at skriva út útboð, lisið tilboð, gjørt tilboðini sambærilig, lisið avtalur og at fáa praktisk viðurskifti avgreidd. Fimm norðurlendskir peningastovnar fingu uppgávuna at røkja íløgurnar hjá landskassanum: Nordea, SEB, Handelsbanken, Nykredit og ein minni íløgurøð til Sydbank.

## Landskassaskuld

Rentuberandi skuldin hjá landskassanum er 4,6 mia. kr. tilsamans. Í juni 2018 minkaði skuldin hjá landskassanum við 500 mió. kr. tá danski staturin avskrivaði teirra krav uppá hendan pening. Hetta var partur av avtalu millum landsstýrið og danska statin, undirskrivað í juni 1998. Avtalað var tá, at hesar 500 mió. kr. bara skuldu rindast aftur til statin, um Føroyar í juni í 2018 høvdu havt inntøku av at vinna olju úr undirgrundini.

[2] Pengar, sum landskassin hevur standandi á bók í Føroyum, verða brúktir til dagliga raksturin hjá landinum. Hesir eru ikki við í Talva 2.

Skuldin hjá landskassanum er sett saman við fimm lánsbrævarøðum. Trý av hesum eru 5-ára lán, eitt er 6-ára lán og eitt er 15-ára lán. Øll lán eru standandi – tað vil siga, at bara renta (og ikki avdráttur) verður goldin í lánitíðini. Lániupphæddin verður goldin aftur í einum, tá ið lánitíðin er av.

Mynd 2 vísir miðal rentuna við ársenda, sum landskassin rindar av hesum fimm lánsbrævarøðum. Í 2018 rindar landskassin í miðal 1,068 prosent í rentu av sínum lánum á 4,6 mia. kr.




*Mynd 2 – Lánsbrævaskuld: Miðal renta ultimo ár*

Vanliga endurfíggjar/tekur landskassin lán á hvørjum ári. 2018 var eitt undantak í so máta. Eitt lítið annuitetslán (restskuld umleið 10 mió. kr.) fall til gjaldingar í 2018, og varð rindað aftur við at brúka av gjaldførinum.

Næsta lán hjá landskassanum fellur til gjaldingar í juni 2019. Lánið er á 1,1 mia. kr., men sum Mynd 1 á síðu 4 vísir, er gjaldførið hjá landskassanum væl omanfyri kravið (minstagjaldførið). Tí verður ikki neyðugt at endurfíggja alla upphæddina, og harvið rindar landskassin nakað niður av síni skuld.

## Kredittmeting

Ratingstovnurin Moody's kreddittmetir Føroyar. Seinasta kredittmetingin er Aa3 við støðugum útlitum, sum er fjórðhægsta rating av 22 møguligum. Fyri at víðka um íleggjaraskaran er ein rating neyðug, og jú betri kredittmeting jú betri er rentan, tá ið landið skal taka lán. Kredittmetingin hjá landskassanum kann eisini brúkast sum útgangsstøði, tá ið fyritøkur og stovnar í Føroyum skulu taka lán.

Moody's vitjar Føroyar eina ferð um árið – seinast í juni 2018. Lánførismetingin er júst dagførd og Føroyar hava framvegis ratingina Aa3 við støðugum útlitum. Allar frágreiðingarnar hjá Moody's um Føroyar liggja á heimasíðuni hjá Landsbankanum.

## Greiningarvirksemi

Nógv orka er sett av til at fáa neyðug hagtøl til vega, sum kunnu brúkast til viðkomandi greiningar. Fyrst skal Landsbankin fáa tølini til vega frá øðrum stovnum. Síðani fremur Landsbankin datareins og tryggjar, at tølini eru røtt. Serliga er tørvur á fíggjarhagtølum, sum kunnu lýsa fíggjargeiran, og sum enn ikki eru at finna hjá Hagstovuni.

Greiningar eru eisini gjørdar við tøkum hagtølum. Í heyst gjørdi Landsbankin frágreiðing um bústaðarmarknaðin og í næstum kemur frágreiðing um innlán, útlán og innlánsyvirskot við støði í bankahagtølum. Kunning um greiningarvirksemi hjá Landsbankanum er at finna á [www.landsbankin.fo](http://www.landsbankin.fo).

Fyri at taka saman um hevur Landsbankin í 2018 víst á:

- Hvussu útlánini hjá peningastovnum hava verið samanborið við búskaparvøksturin (BTÚ) síðani 1980. Hetta er ein av fleiri indikatorum, sum kunnu siga okkum nakað um fíggjarliga støðufestið.
- At búskaparvøksturin ikki er fíggjaður við kredittveiting frá føroyskum peningastovnum. Hóast búskapurin er vaksin nógv,

hevur útlánsvøksturin hjá føroyskum peningastovnum sum prosent av BTÚ verið fallandi.

- At innlánsyvirskotið í føroyskum peningastovnum hjá húsarhaldum hevur verið vaksandi síðani 2013. Tað vil siga, at húsarhaldini hava sett fleiri pengar inn í bankan, enn tey hava tikið í lán.
- At stórur ójavni er í sethúsaprísum millum sethús í miðstaðarøkinum samanborið við aðrastaðni í landinum.
- At hægstu sethúsaprísirnir eru í Tórshavn, men at største príshækkingin seinasta árið hevur verið í teimum størru bygdunum.
- At útlán til sethúsabygging síðani 2013 í størri mun hava verið veitt húsarhaldum sum vanlig bankalán við broytiligari rentu úr føroyskum peningastovnum, enn sum donsk realkredittlán. Tó er ábending nú um, at fleiri taka realkredittlán.
- At lága rentustøði er eitt gylt høvi at rinda skuld niður.
- At fíggjarstøðan hjá kommunum er nógv batnað síðani kreppuna í 1993. Tá var skuldarbyrðan 367 prosent. Í 2017 var skuldarbyrðan 21 prosent, sum merkir, at kommunurnar kunnu læna slakar 2 mia. kr. uttan at raka loftið í kommunulógini.
- At persónliga pensjónsuppsparingin var 9,5 mia. kr. Av hesum vórðu umleið 7,4 mia. kr. settar í føroyskar peningastovnar og 2,1 mia. kr. í útlendskar stovnar. Hetta var við ársenda 2017 og svarar umleið til miðal uppsparingina í OECD-londunum.
- At húsarhaldini eiga meginpartin av teimum pengum, sum standa á konto í føroyskum peningastovnum, 2/3 ella tilsamans 10 mia. kr., meðan privata vinnan eigur ein fimtapart. Húsarhaldini fevna um løntakarar, pensjónistar og sjálvstøðug vinnurekandi.

## Fíggjarviðurskifti Landsbankans

Landsbankin hevur nettojáttan á fíggjarlógini. Á inntøkusíðuni er játtanin 0,4 prosent av minstagjaldførinum. Tað svarar til 10,7 mió. kr. í 2018. Harafturat hevur Landsbankin inntøku av at umsita Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og somuleiðis eina lítla inntøku av at umsita ogn hjá almennum grunnum. Tilsamans gav hetta eina inntøku á 1,5 mió. kr. í 2018. Samlaðu inntøkurnar eru 12,2 mió. kr.

Størsta útreiðslan hjá Landsbankanum er til lønir, sum eisini umfatar nevndarsamsýningar og almenn gjøld. Lønarútreiðslurnar í 2018 vóru 4,7 mió. kr. – hetta er ein hækking á 600 t.kr. samanborið við 2017. Hækkingin kemur av, at eitt nýtt starvsfólk varð sett í árinum, umframt at Váðaráðið, sum Landsbankin fíggjar, eisini byrjaði at virka í 2018. Í 2019 eru tvey nýggj starvsfólk sett, og tí fara lønarútreiðslurnar í 2019 at vera hægri enn í 2018.

Keyp av vørum og tænastum var 1,7 mió. kr. í 2018. Hetta er í stóran mun fyri KT, virðisbrævabókhald og aðra sakkøna hjálp – eisini Moody's. Hesin posturin var nakað minni enn í 2017.

Samlaðu útreiðslurnar hjá Landsbankanum vóru 6,8 mió. kr. í 2018.

## Føroya Váðaráð

Føroya Váðaráð hevði sín fyrsta fund í mars 2018 og hevði tilsamans fýra fundir í árinum. Váðaráðið hevur til uppgávu, eins og Landsbankin – við støði í greiningum – at staðfesta váðar. Meðan Landsbankin hyggur yvirskipað at váðum, hyggur Váðaráðið bara eftir *systemiskum* váðum. At ein váði er systemiskur merkir, at talan er um ein veikleika ella eina ójavnvág í sjálvari fíggjarskipanini, sum økir um vandan fyri, at ein fíggjarkreppa kann taka seg upp. Tað vil siga, at váðin ikki bara er galdandi

fyri ein einstakan peningastovn, men allar peningastovnarar og harvið alt fíggjarkervið.

Føroya Váðaráð er skipað við 5 limum, sum eru valdir í fýra ár í senn. Løgmaður velur limir og varalimir í ráðið eftir tilmælum frá myndugleikum, ið virka fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum. Limir í Føroya Váðaráðið eru:

- Malan Johansen, stjóri, Landsbanki Føroya (forkvinna)
- Jesper Rangvid, professari, CBS
- Bjørn Rúnar Gudmundsson, skrivstovustjóri, Hagstova Íslands
- Bjarni Askham Bjarnason, aðalstjóri, Fíggjarmálaráðið
- Jógvan Thomsen, stjóri, Vinnustovnurin

Fyri hvønn fund Váðaráðið hevur, verður tíð-indaskriv sent út um tey evni, sum hava verið umrødd á fundinum. Hesi tíðindaskriv liggja á heimasíðuni www.landsbankin.fo.

Váðaráðið hevur í 2018 millum annað víst á at:

- Ansast má eftir, at vøksturin í sethúsaprís-unum ikki heldur fram ótálmaður, serliga í miðstaðarøkinum.
- At almenni geirin hevur lutfalsliga stór inn-lán í føroysku peningastovnunum. Hugt verður at, hvar almennir stovnar og feløg skulu seta sínar pengar.
- Almennir myndugleikar ikki eru fevndir av innskjótaragarantiskipanini.
- At førdi makrobúskaparligi politikkurin eigur at leggja upp fyri, at búskaparliga gongdin kann venda.



Kvíggjartún 1 ▪ Postsmoga 229 ▪ 165 Argir
+298 360600 ▪ landsbankin@landsbankin.fo